

www.oljan.fo

**Jan Müller** 06 - 01 - 2013

# Lívligur norskur oljuelefantur

Tað kom heilt óvart á oljuheimin, tá ein risastórur oljuelefantur varð funnin á norska landgrunninum fyri góðum ári síðani í einum øki, har vónirnar til nýggj fund vóru sleptar fyri árum síðani. Talan er um oljukelduna Johan Sverdrup, sum er mett at vera ein tann størsta oljukeldan, ið yvirhøvur er funnin á norska landgrunninum. Nú vísir ein nýggjur avmarkingarbrunnur á Johan Sverdrup leiðini, at oljukeldan helst er enn størri enn upprunaliga mett, og at góðskan av goymsluni er sera góð. Tað var í 2011, at oljufeløg raktu við eitt tað størsta oljufeltið, sum nakrantíð er gjørt á norska landgrunninum. Og var tað eisini størsta fundið í øllum heiminum hetta árið. Seinastu tølini fyri kelduna vísa, at har kunnu vera millum 1,7 og 3,3 milliardir tunnur av olju fjaldar undir havbotninum. Keldan er so stór, at hon fevnir um tvey ymisk loyvi. Feløgini, sum eru partur av hesi oljukelduni, eru Statoil, Det Norske Oljeselskap, Lundin og Maersk Oil. Fyrsta oljan er sett til 2018. Eitt felag, sum Maersk fer tá at standa fyri 50.000 tunnum av olju um dagin, tá oljukeldan fer undir framleiðslu.